## Kjak í Miðlahúsinum

Barsilsskipanin, javnstøða og arbeiðsmarknaður verða evnini á kjakfundi, sum Kvinnufelagið í Havn skipar fyri í Miðlahúsinum mánakvøldið 26. mai. Hvussu gera vit tað meira lokkandi at vera nýbakað barnafamilja í Føroyum? Og hvussu laga vit barsilsskipanina til, so hon livir upp til nútíðar krøv um javnstøðu og til broytta arbeiðsmarknaðin? Hesar og nógvar aðrar brennandi spurningar verður varpað ljós á í Miðlahúsinum mánakvøldið 26. mai. Á skránni verður peptalk við Kristionnu Winther Poulsen, forkvinnu í Javnstøðunevndini, vísdómsorð frá Maritu Rasmussen, stjóra í Vinnuhúsinum, og Jenny A. í Heiðunum sigur sína hjartans meining um at vera í barsilsfarloyvi við tveimum smáum børnum, meðan karrieran sum Conference & Event Manager á Hotel Føroyum eisini krevur sítt. Tiltakið byrjar kl. 19.30 og er alment, sigur Kvinnufelagið í Havn.




# TAKS virðir ikki fyrisitingarrættin



*Hóast talan er um púra eins mál, so noktar Taks at fylgja fyrisitingarrættinum, sum ovasti fyrisitingarmyndugleiki hevur fastlagt*

### FAKTA

**1. mai 1999** vórðu dagføringar gjørdar í lógini um skrásetingargjald fyri innflutning av bilum.
**28. apríl 2005** verður lógin broytt, soleiðis at heimildin at krevja inn ætlaða gjaldið verður í lagi.
**25. oktober 2006** ger hjá Skatta og avgjaldskærunevndini úrskurð í kærumáli. Har verður staðfest, at tað ikki var lógarheimild at krevja inn millum 1 mai 1999 til 28 apríl 2005.
**26. mars 2008** tekur Skatta- og avgjaldskærnevndin avgerð um, at avgerðin frá 25. oktober skal fylgjast, so leingi sum annar dómur ikki fyriliggur í málinum. Skatta- og avgjaldskærunevndin er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki innan skatta- og avgjaldsøkið.
**15. apríl 2008** sendir Taks út tíðindaskriv. Her staðfestir stovnurin, at tey ikki meta Skatta- og avgjaldskærunevndina hava heimild at fastleggja rættarstøðuna í málum, sum ikki eru løgd fyri nevndina.
**7. mai 2008** afturvísir Taks kæru frá borgara, sum hevur kravt mvg-afturbering í samband við keypi av persónbili. Talan er um mál millum borgaran og bilasøluna, sum hevur selt bilin, sigur Taks.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin er hægsti fyrisitingarliga myndugleikin innan økið. Men hóast nevndin hevur tikið avgerð. Og hóast Taks hevur fingið boð um, at henda avgerð skal fylgjast. So noktar stovnurin framvegis at endurrinda mvg, sum er kravt inn uttan lógarheimild**

MVG
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

»Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tikið eina avgerð, og so leingi, sum henda ikki er broytt við dómi, er rættarstøðan, sum nevndin er komin til, galdandi. Taks má fylgja avgerðunum hjá nevndini...«

Somikið greiður var úrskurður, sum ovasti Skatta- og avgjaldskærunevndin gjørdi tann 26. mars í ár í kærumáli, sum borgari hevði sent, tí Taks noktaði at viðgera umsókn hansara um at fáa endurgoldið mvg av persónbili.

Skatta- og avgjaldskærunevndin gjørdi longu í oktober 2005 úrskurð, har borgari fekk viðhald í, at Taks – táverandi Toll- og Skattstova Føroya – uttan lógarheimild hevði kravt mvg í sambandi við keyp av persónbili. Hetta orsakað av einum lógartekniskum mistaki, sum fevnir um allar nýggjar persónbilar, sum eru keyptir í tíðarskeiðnum 1. mai 1999 til 28. apríl 2005.

### Skifta grundgeving

Tann úrskurðurin fekk annan borgara at kæra um líknandi viðurskifti, men Taks noktaði at viðgera málið, vísandi til at stovnurin í løtuni hevur kært líknandi mál til Føroya Rætt, og at eingin avgerð enn fyriliggur í hesum.

Úrskurðurin hjá nevndini frá mars mánaði tvingaði tó Taks at taka málið upp. Men hóast talan er klokkuklár, hevur hetta ikki fingið Taks at fylgja úrskurðinum. Heldur ikki, hóast talan er um úrskurð, ið er sagdur av hægsta fyrisitingarliga myndugleika á skatta- og avgjaldsøkinum.

Tvørtur ímóti, so noktar Taks at geva borgaranum viðhald í málinum. Hesa ferð við tilvísing til, at tað ikki er stovnurin, ið hevur kravt inn meirvirðisgjaldið.

»Taks er av tí áskoðan, at afturgjalding av mvg bert kann koma upp á tal eftir reglunum í §24 í meirvirðisgjaldslógini, te afturgjald frá Taks til meirvirðisgjaldsskrásett virki. «

Við øðrum orðum vil tað siga, at Taks nú sigur, at talan er um mál millum bilasølu og keypara.

Víðari stendur skrivað, at Taks út frá hesum ikki fer at endurrinda av mvg'ið av skrásetingargjaldinum. Men at hetta ístaðin er eitt mál millum borgaran og bilasøluna.

### Bróta fyrisitingarrættin

Sum ovasti fyrisitingarliga myndugleiki innan økið, er tað Skatta- og avgjaldskærunevndin, sum ásetur rættarstøðuna í málum innan skatta- og avgjaldsøkið.

Í úrskurði, sum varð gjørdur í nevnda máli í mars mánaði, staðfesti nevndin, at Taks má fylgja teimum avgerðum, sum nevndin kemur til.

Málið, sum er viðgjørt her á síðuni, er meinlíkt øðrum máli, har Taks – eftir boðum frá Skatta- og avgjaldskærunevndini – hevur endurrinda mvg til borgara. Men hóast hetta viðgerð Taks ikki núverandi mál á sama hátt.

Málið, har peningur er goldin, er kært til Føroya Rætt, og í tíðindaskrivi, sum varð sent út í apríl mánaði, sigur Taks, at tey ikki taka undir við, at Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur heimild til at fastleggja rættarstøðuna í málum, ið ikki eru løgd fyri nevndina til støðutakan.

Við øðrum orðum noktar Taks at góðtaka, at ovasti fyrisitingarligi myndugleikin hevur heimild at fastleggja rættarstøðuna.

### Bíða eftir Taks

**Vit ætlaðu at fáa viðmerkingar til málið um mvg-endurgjald fyri persónbilar frá Taks. Telefonboð eru løgd til stjóran á Taks í morgun, men fyri evstamark okkara høvdu vit ikki frætt aftur.**

**-mørk**

## Søgdu seg ikki hava upplýsingar

**Hóast Taks longu hevði útflýggjað upplýsingar um mvg av skrásetingargjaldi, helt stovnurin fast uppá, at tey ikki høvdu hesar upplýsingar**

MVG
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í málinum, sum er lýst aðra staðni á síðuni, fekk Taks boð um, at stovnurin skuldi viðgera kravið, sum borgarin hevði reist.

Í hesi viðgerð sendi Taks borgaranum bræv, biðið var um nærri upplýsingar um krøvini. Herundir upplýsingar um skrásetingargjald og mvg av hesum.

Veruleikin var tó samtundis, at Taks fleiri mánaðir frammanundan hevði útflýggjað borgaranum somu upplýsingar.

1. oktober í fjør sendi Taks nevnliga skriv til borgaran, har upplýst var, hvussu stórt ávikavist skrásetingar- og meirvirðisgjaldið av bilinum var.

Tá talan er um skrásetingargjald hevur Taks allar upplýsingar tøkar í telduskipan sínari. Upplýsingar um hetta eru atkomuligir hjá starvsfólki, um bert tey hava nummarplátuna á bilinum.

Borgarin vísti eisini skrivinum frá Taks aftur við boðum um, at Taks longu hevði umbidnu upplýsingarnar og tí kundi viðgera málið.